

**ØSKUFØST** Eftir at hava staðið í fullkomiligari óvissu síðan hósdagin, nær tey fóru at sleppa heimaftur til Føroya, og hvussu leingi tey vórðu noydd at drýggja seinastu oyruni, sluppu næmingar og leiðarar á Rásini í gjár, heim við Atlantsflogi úr Glasgow. Vit vóru við á ferðini

Rógvi Nybo

Klokkan 14.05 í gjár setir Atlantsflog RC1415 úr Glasgow seg í Vágum. Umborð eru 20 ferðafólk, sum hava verið føst í Bretlandi, orsakað av øskuni, teirra millum sjey næmingar og tríggir ferðaleiðarar av Rásini í Saltangará, sum er eitt skúlatilboð til ung við breki.

Síðani flogbann varð sett í flestu loftrúmum í Evropa hósdagin í farnu viku, orsakað av gosøskuni úr Eyjafjallajøkli í Íslandi, hava hundraðtúsundtals ferðafólk verið ávirkað og seinkað, og fleiri túsund flogferðir eru avlýstar. Tey flestu hava klárað seg væl, summi hava tikið nýtslu av alternativum ferðaháttum, eitt við skipi ella øðrum.

Tó hevur seinasta vikuskiftið hjá fleiri verið merkt av, at tey ikki vistu um tey vóru keypt ella seld. Flogferðirnar vóru avlýstar av náttúruávum, og hava flogfeløg og tryggingarfeløg verið skjót at melda út, at tá talan er um avlýsingar orsakaðar av náttúruvanlukkum, hava tey ikki skyldu til at gjalda eitt oyra út í endurgjaldi. Tí hevur tað verið fyri egna rokning, at fólk hava verið noydd at uppihalda seg har, tey vóru stødd. Tey tíggju av Rásini vóru einki undantak.

Í løtum sá henda ferðin til London, sum skuldi geva næmingunum á Rásini eitt upplivilsi fyri lívið og nógv nýggj input, út til at kunna gerast ein fíggjarlig marra, tá tey brádliga ongan veg sluppu.

## Eingin góða mamma

Ferðin hjá næmingunum á Rásini lakkaði móti endanum hósdagin, tá øskan legðist yvir Evropa. Fríggjadagin skuldi nøsin vendast heimeftir aftur, og skuldu tey flúgva úr London til Kastrup. Men ongan veg sluppu tey.

- Vit skuldu við Norwegian til Kastrup, og í Danmark skuldu vit eisini fara ein túr inn í Tivoli, nakað tey høvdu glett seg óført til. Men tað bleiv so av ongum, greiddi Morten Hust Petersen frá.

Tí var tað eisini sum at fáa ein vátan vøtt í andlitið, tá tey fingu at vita, at ferðatryggingin ikki dekkaði óvæntaðu útreiðslurnar av seinkingini.

- Hetta kostar okkum 3500 krónur um dagin, bara í gisting, umframt mat og drekka, segði Morten Hust Petersen, leiðari á Rásini, við Portalin sunnumorgunin.

Tey høvdu tá roynt allar hugsandi loysnir fyri at sleppa til Føroyar, eisini møguleikan at fara norður til Skotlands og møguliga sleppa hagani við onkrum fiskiskipi, sum landaði í Skotlandi.

- Vit hava enntá umhugsað at leiga hýruvogn úr London til Danmarkar, so at vit kunnu sleppa heim við Norrønu, men tað kostar einar 20.000 krónur og tað er ikki bíligari at leiga bil til Danmarkar, segði Morten Hust Petersen tá.

Sunnudagin sá sostatt einki serligt út hjá teimum á Rásini, og eingin visti at siga, nær flogbannið fór at hæsa av.